# Liðugt við svartkjaftinum

**Fiskiveiðieftirlitið hevur steðgað øllum føroyskum fiskiskapi eftir svartkjafti**

SVARTKJAFTUR
*Heri á Rógvi*



Øll veiða eftir svartkjafti hjá føroyskum skipum er steðgað. Øll skip, ið royna eftir svartkjafti, hava fingið greitt at vita, at nú er liðugt við at royna eftir svartkjafti.

Mánamorgunin kom soljóðandi fráboðan frá Fiskiveiðieftirlitinum:

»Sagt verður frá, at Fiskiveiðieftirlitið í morgun, hevur steðgað føroyskum fiskiskapi eftir svartkjafti.

Sambært § 1 í kunngerð nr. 81/2002 var felagskvotan 193.400 tons. Skrásett eru 193.440 tons. Tí hava skipini fingið boð at steðga fiskiskapinum í stundini.«

*Krúnborg og hini skipini, ið royna eftir svartkjafti, mugu gevast við hesum restina av árinum. Tað verða væntandi tey skipini, ið ongar aðrar kvotur eiga, sum fáa ágóðan av teimum 6.600 tonsunum, landsstýrismaðurin hevur at ráða yvir*

### Avgerð takast

Sum nevnt er talan um eina felagskvotu aljóðandi 193.400 tons. Samlaða kvotan er 200.000 tons. Tey írestandi 6.600 tonsini ræður landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, Jørgen Niclasen, yvir.

Tá vit ringdu til hansara týsmorgunin, segði landsstýrismaðurin, at hann enn ikki hevði tikið støðu til, hvar tey 6.600 tonsini skulu plaserast. Tað vóru tó greiðar ábendingar um, at tey skipini, ið onga aðru kvotu hava, fara at fáa gleði av teimum 6.600 tonsunum.

Landsstýrismaðurin greiðir frá, at avgerðin um at hava eina felagskvotu sum í hesum førinum var tikin í samráð við vinnuna. Avgjørt varð at seta 6.600 tons til landsstýrismannin av ráða yvir.

– Nú hendi tað, sum vit ikki roknaðu við, sigur Jørgen Niclasen.

Landssstýrismaðurin ger greitt, at skipanin ikki verður soleiðis sum nú komandi ár.

# Clickhaze fær rós í Danmark

**Danska blaðið Information gevur Clickhaze eitt sera gott ummæli fyri EP-útgávuna. Serliga er ummælarin hugtikin av tulkingini av Kingo**

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*

Danska blaðið Information hevur lurtað eftir EP-fløguni hjá Clickhaze, sum kom út í Danmark í august mánaði.

Og teir eru hugtiknir av tónleikinum hjá føroyska bólkinum

– Det siges at regne meget på Færøerne og det tror man gerne, når man hører den debuterende septet Clickhazes stemningsladede og sfæriske debut-cd, seks sange med den fordringsløse titel EP, fire sange på engelsk, en på dansk og en på lige dele færøsk og dansk. Størst indtryk gør de to sidstnævnte, hvis tone kun kan betegnes som Nordisk For Fuld Skrue og hvor originaliteten er til at tage og føle på, skrivar ummælarin hjá blaðnum

### Kingo á toppinum

Hann er serliga bergtikin av Sorrig Och Gledje hjá Thomas Kingo, sum bólkurin hevur gjørt ein spennandi útgávu á.

– Arrangementet af den klassiske melodi til Thomas Kingos »Sorrig og glæde« kan sateme få de små hår på arme og i nakke til at stritte, kan De tro! Tonstungt og manende med Eivör Pálsdóttirs såvel smukke som skræmmende vokal er det på en gang selvlysende klart og dystert uigennemtrængeligt... lyden af at være faret vild i fjeldet, fortabt i tågen, kæmpende for livet i kolde bølger osv. – man kan virkelig mærke elementernes rasen i denne tonstunge og dog fjerlette musik, skrivar Information.

Eisini sangirnir, sum eru tiknir upp á konsertum, fáa eitt gott orð við á vegnum.

– Cd'ens tre velsiddende livenumre demonstrerer suverænt hvor effektiv brugen af dynamik kan være, og i det hele taget emmer dette tiltag af et imponerende potentiale. Clickhaze er som en forelskelse af både værste og bedste skuffe: Opløftende og berusende, men også fuld af gråd og tænders gnidsel. Vi bøjer os i støvet for disse færøske fantaster.






UNIVERSITY OF ABERDEEN

VETRARSKEIÐ

LÆR ENSKT Í SKOTLANDI

Intensivt skeið á University of Aberdeen
1, 2 ella 3 vikur

SKEID 1:
21. Oktober – 13. Desember
Byrjanarskeið: Tey, sum duga enskt á byrjunarstøði.

SKEID 2:
13. Januar – 21. Mars
Miðal: Tey, sum hava nakað av kunnleika til enskt frammanundan.

SKEID 3:
7. Apríl – 20. Juni
Yvir miðal: Tey, sum hava kunnleika í enskum, men vanta royndir til víðari lestur.

KOSTNAÐUR FYRI HVØNN:

| 1 vika | 2 vikur | 3 vikur |
|---|---|---|
| 7.949,- | 12.549,- | 17.749,- |

Íroknað prísin er:
Flogferð Føroyar – Aberdeen og aftur við ferðaavgjøldum. Undirvísing í minst 20 tímar um vikuna + kjak tímar. Undirvísingartilfar. Innivist á einakamari á skúlaheiminum Kings Hall.

Ferðatrygging er ikki íroknað.

Ivast tú í, hvørjum støði tú ert á, so kanst tú tosa við ein lærara á University of Aberdeen, sum hjálpir við at finna rætta skeiðið.

Um gist verður á hotelli ístaðin fyri á skúlaheiminum, kostar tað 900 krónur eyka um vikuna.

Ring og fá meiri at vita um skeiðini á tel. 34 10 40, Atlantic Airways.

Les meira á heimasíðuni hjá University of Aberdeen www.abdn.ac.uk

ATLANTIC AIRWAYS
Floqvøllurin · FO-380 Sørvágur
Tel: 34 10 40 · Fax 34 10 01 · booking@atlantic.fo
www.atlantic.fo




# Øll arbeiðsfólkini hjá MBM-Kjøti eru uppsøgd

**– Vit arbeiða við eini umlegging av virkseminum, sum skal verða liðug til ársskiftið. Virksemið í Hósvík heldur ikki uppat, og málið er at seta øll fólkini í starv aftur, sigur stjórin á Mjólkarvirki Búnaðarmanna, Eirikur Thorvaldsson**

UPPSAGNIR
*Vilmund Jacobsen*



*– Tað eru framleiðslur, sum geva meira og aðrar, sum geva minni. Vit fara í fyrsta lagi at leggja okkum eftir teimum framleiðslum, sum geva avkast, sigur Eirikur Thorvaldsson, stjóri á Mjólkarvirki Búnaðarmanna*

Mánadagin fingu øll arbeiðsfólkini hjá MBM-Kjøti í Hósvík at vita, at tey eru uppsøgd sambært galdandi sáttmálum.

Eirikur Thorvaldsson, stjóri á MBM, sigur, at hetta í fyrsta lagi er ein formell uppsøgn, nú arbeitt verður við eini umlegging av virkseminum hjá virkinum.

– Uppsøgnirnar merkja ikki, at virksemið hjá MBM-Kjøti heldur uppat. Vit hava gott fólk í Hósvík og gongur alt, sum ætlað, vænti eg, at øll verða sett aftur í starv, tá ið umleggingin er framd; tí fara vit eisini heilt skjótt at kunna fólkið um, hvat tey kunnu vænta sær.

Á MBM-Kjøti er eisini ein slaktaralærlingur, men hann er ikki uppsagdur.

Eirikur sigur, at MBM hevur valt at geva arbeiðsfólkinum ávikavist 3 og 4 mánaðar uppsagnartíð – alt eftir, hvussu leingi tey hava verið í starvi hjá felagnum.

### Konseptið er ikki nóg gott

Stjórin vísir á, at ein umlegging er neyðug, tí virksemið hongur ikki saman sum er. Ætlandi verður henda umlegging liðug um ársskiftið.

– Vit hava nú brúkt seks ár at byggja hetta virksemi upp, men kappingin frá eitt nú Krás og Miklagarði er ógvuliga hørð. MBM-Kjøt hevur havt undirskot á hvørjum ári, og í ár verður talan um eina miljón, tá ið alt er tikið við.

Eirikur sigur, at MBM hevur hjálpt virkinum í Hósvík at fóta sær, og hann heldur einki skeivt vera í, at hetta er gjørt.

– Men seks ár er long tíð og tá ið tað, tú gert, ikki gongur í longdini, er neyðugt at gera okkurt annað. Tað er hetta, vit fara at gera nú. Konseptið er ikki nóg gott og má broytast, sigur hann.

Stjórin vil ikki siga nágreiniliga, hvussu virksemið hjá MBM-Kjøti verður í framtíðini, men hann vísir kortini á, at tað eru framleiðslur, sum geva meira og aðrar, sum geva minni.

– Vit fara so í fyrsta lagi at leggja okkum eftir teimum framleiðslum, sum geva avkast.

### Serliga neytini

Eirikur sigur, at tað primera hjá MBM-Kjøti øll árini hevur verið føroysku neytini og góðskingin av neytakjøti. Fyri 2-3 árum síðan fór MBM eisini at keypa neytakjøt úr Danmark, sum eisini hevur verið brúkt í framleiðsluni av lidnum vørum. Aftrat neytakjøti, hevur MBM keypt nakað av grísakjøti úr Danmark.

Spurdur, hvønn týdning seyðurin hevur um heyst-arnar, sigur Eirikur, at hetta hevur meira at kalla verið »hobby« aftrat tí, sum hevur verið frammanundan, tí tíðarskeiðið, seyðurin verður flettur, er so stutt.

Stjórin sigur, at henda støðan á MBM-Kjøti er so nýggj, at teir enn ikki hava kunnað Poul Michelsen, sum selir framleiðsluna fyri virkið í Hósvík, um uppsagnirnar.

– Gongur alt, sum ætlað, hava vit eitt nýtt konsept í Hósvík um ársskiftið, sigur Eirikur Thorvaldsson, stjóri á MBM, at enda.

# Vit fáa ikki betur fólk enn tey, vit hava

**– Vit spæla við opnum kortum, og fólk eru positiv um framhald, sigur dagligi leiðarin á MBM-Kjøti, Adolf Johannesen**

UPPSAGNIR
*Vilmund Jacobsen*



*– Tað er altíð keðiligt at noyðast at siga fólki úr starvi, og ongum dámar hetta betur enn nøkrum øðrum. Men MBM hevur valt at spæla við opnum kortum og kunna fólkið um tað, sum fer fram, sigur dagligi leiðarin, Adolf Johannesen*

Sjey fólk eru í starvi hjá MBM-Kjøti í Hósvík. Dagligur leiðari er klaksvíkingurin, Adolf Johannesen.

Vit spurdu hann, hvussu uppsagnirnar eru móttiknar.

– Tað er altíð keðiligt at noyðast at siga fólki úr starvi, og ongum dámar hetta betur enn nøkrum øðrum. Men MBM hevur valt at spæla við opnum kortum og kunna fólkið um tað, sum fer fram.

Adolf sigur, at fólk eru positiv, og hann vónar, at tey vilja halda fram, tá ið tann tíðin kemur.

– Betur fólk enn tey, sum í dag starvast hjá okkum, fáa vit ikki. Hesi eru av raskastu fólkum, leggur hann dent á.

Eins og Eirikur, ásannar Adolf, at kappingin við stóru handlarnar er ógvuliga hørð, og tí noyðist virkið í Hósvík í framtíðini at leggja seg meira eftir teimum framleiðslum sum geva avkast og skera tær burtur, sum geva undirskot.

### Selja sjálvir

Adolf sigur, at MBM-Kjøt hevur sáttmála við heitt nú heilsøluna hjá Poul Michelsen um levering og sølu, og hendan avtalan skal haldast.

– Vit selja eisini til aðrar heilsølur, men her hava vit ikki sáttmálar í sama mun sum við Poul Michelsen.

Hann vísir annars á, at MBM-Kjøt selir helmingin av framleiðsluni sjálvt, sum virkið stendur fyri.

– Vit selja beinleiðis til fólk, og vit selja eitt nú til kantinur og stovnar, sigur dagligi leiðarin.

Hann sigur, at MBM-Kjøt er undir strongum eftirliti og hevur brúkt nógvan pening til eftirlit av sínum vørum.

– Tað vil altíð vera soleiðis, at okkurt er, sum kann gerast betur, men sum heild hava vit nøgd viðskiftafólk, sigur Adolf.

### 2000 seyðir

Nú skurðfjøll verða gingin, spurdu vit leiðaran, hvussu nógvar seyðir MBM-Kjøt væntar at fletta í heyst.

– Vit flettu 1500 seyðir síðsta heyst, og gongst sum ætlað, verður talið 2000 í heyst, og tá fer tað at líkjast avkasti, sigur Adolf Johanne sen at enda.